

SPENNANDI

*Starvið sum sølumaður er nógv broytt, tey 25 árini Petur Hermansen hevur vitjað handlarnar kring landið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Petur 35 ára starvsdag

## Í gjár vóru 35 ár liðin síðani Petur Hermansen kom í starv hjá Poul Michelsen, heilsølu, seinastu 25 árini sum sølumaður

Leo Poulsen

15. juni 1975 byrjaði Petur Hermansen sum bilførari í heilsøluni hjá Poul Michelsen. Fyrstu tíðina koyrdi hann vørur kring alt landið, men seinni vórðu tað handlarnir í Havnini, sum javnan fingu vitjan av Peturi.

– Eg fekk so í boði at koma inn á goymsluna, og var formaður har eina tíð, áðrenn eg fekk mítt núverandi starv sum sølumaður í boði, sigur Petur Hermansen.

Nógv er broytt hesi 25 árini, Petur Hermansen hevur ferðast landið runt og selt vørur til handilsmenninar.

– Tá eg byrjaði, kundu handilsmenninir saktans slíta ein sølumann upp. Sølumenn vóru ikki líka væl sæddir alla staðni, og tú mátti passa tær løðir, so tú ikki rendi teg í ein annan sølumann inni í handlunum, sigur Petur Hermansen.

Í dag er heilt øðrvísi.

– Í dag eru innkeypararnir sum regul ung fólk, sum eru bæði erlig strukturerað og vita, hvat tey vilja. Í mun til fyrr er ein avtala í dag ein avtala, og ikki nakað, sum bleiv útsett fleiri ferðir, áðrenn hadilsmaðurin endiliga hevði tíð, sigur Petur Hermansen.

Eisini í aðrar mátar er starvið sum sølumaður broytt hesi seinastu árini.

– Eg haldi eg fari ikki skeivur tá eg sigi, at eg var tann fyrsti sølumaðurin, sum slapp at skriva vørur upp sjálvur í einum handli. Eg havi alla tíðina arbeitt fram ímóti tí. Og tá tað fyrst var sett á skinnarar, breiddi tað seg skjótt til aðrar handlar eisini, so nú passi eg mest sum sjálvur handlarnar, sigur Petur Hermansen.

Fyrr kom vøran í handlarnar tá hon nú einaferð kom, men í dag er altíð ein deadline at yvirhalda.

– At vera sølumaður í dag er eitt starv við nógvari ferð, men tað er samstundis eisini eitt ógvuliga spennandi starv, sigur Petur Hermansen, sum saman við hinum starvsfólkunum fekk lagkøku frá stjóranum á stóra degnum í gjár.

# 50.000 at ferðast fyri



HEPPIN

*Tað var Regin Joensen undir Gøtueiði (vinstrumegin), sum vann nógvu ferðakrónurnar hjá Dansifrøi*

Tað var Regin Joensen, sum gjørdist hepni vinnarin av 50.000 krónum at ferðast fyri í lutaseðlakappingini hjá Dansifrøi.

Í sambandi við, at felagið tók nýggju dansihøllina í brúk, vórðu gjørdir 200 lutaseðlar, sum skuldu seljast fyri 1.000 krónur stykkið. 120 vórðu seldir og millum teir var so lutur drigin, og seðil nummar 78 vann. Og tann seðilin hevði Regin Joensen undir Gøtueiði keypt.

Í gjár varð so vinningurin – eitt gávukort á 50.000 krónur frá Fonn Flog – handaður Regini Joensen.

Hann hevur ikki gjørt av enn, hvar leiðin gongur fyri ferðapengarnar, men tað stendur greitt, at tann ferðin verður ikki gjørd í ár.

- Ferðin í ár er longu keypt og goldin, so hetta gávukortið verður ikki nýtt fyrr enn í næsta ár, sigur Regin Joensen, sum tískil hevur góða tíð at hugsa seg um og leita perfektu feriuna fram.

# Fíggjareftirlitið kannar Parkina

## Parken Sport & Entertainment hevur seinastu tíðina verið nógv í fjølmiðlunum orsakað av innanhýsis ósemju og fíggjarligar trupulleikar. Nú er fíggjareftirlitið eisini farið at hyggja nærri at felagnum

Leo Poulsen

Fíggjareftirlitið er farið í holt við at endavenda undirhaldsfelagið, og serliga verður hugt eftir umfatandi handlinum við egnum partabrøvum. Tað skriva danskir miðlar.

Parken byrjaði á vári 2008 umfatandi keyp av egnum partabrøvum. Hetta helt fram í longri tíð, inntil fyrrverandi formaðurin, Flemming Østergaard útloysti partabrævaoptiónirnar og vann 15 milliónir krónur í endanum av apríl.

Fleiri serfrøðingar hava fyrr funnist at Parkini fyri at gera íløgur í egin partabrøv, og hildið verður, at kursurin harvið er hildin kunstiga uppi.

– Tað eru fleiri ting, tú bítir merki í, tá hugt verður eftir handlinum hjá Parkini við egnum partabrøvum. Serliga er tað mongdin og tíðin, og tað er upplagt, at eftirlitið nú sær hesi viðurskifti eftir nærri, sigur Nis Juel Clausen, serfrøðingur í børsrætti við SDU.

### Fingið viðmerking

Áhugin hjá Fíggjareftirlitinum fyri Parkini kemur í kjalarvørrinum av, at Parkin í endanum av 2009 fekk eina viðmerking frá Fondsbørsinum.

Viðmerkingin komst av, at Parkin ikki hevði klártlagt innaru reglarnar fyri, hvussu handilin við egnum partabrøvum skuldi fara fram. Slíkar reglur eru annars vanligar í børsskrásettum feløgum.

Í Fíggjareftirlitinum er ikki áhugi í at gera viðmerkingar til sakina.

– Vit kunnu ikki úttala okkum um ítøkilig mál við atliti til lóggávuna og viðkomandi felag, hvørki í hesum málinum ella øðrum, sigur Hanna Råe Larsen, børsstjóri í Fíggjareftirlitinum.

Heldur ikki núverandi formaður í Parkini, Lars Johansen, vil gera nakra viðmerking til málið, skrivar Børsen.